# Garðar verða laðaðir

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Nú er hægsta lembingartíð og kring landið verður hampað um garðarnar. Um ikki so langa tíð, so skal seyðurin aftur í hagan. Myndin er tikin í Oyndarfirði leygardagin, har menn í Próstahaganum laða garðar. Hetta verður gjørt í felag av jarðareigarunum og er vorðin ein hugnaligur siður, ið verður endurtikin ár um ár.

Í vetur hava verið nógv skriðulop kring, men garðurin norðuri í bø í Oyndarfirði slapp væl. Beint norðanfyri har hendan myndin er tikin leyp stór skriða og varð garður fyri, so var hann horvin í dag.

Oyndfirðingar taka nøkur petti í botn á hvørjum ári og á tann hátt skuldi garðurin kring bygdina verið laðaður av nýggjum, tá nøkur ár eru liðin. Væl hava teir gomlu lagt steinarnar. Teir niðastu liggja tryggir og væl klíptir og tað skal bæði jarnbrot og snildni til, vil tú flyta teir uttan maskinur, her burtur frá vegi og fólki.

Onkur heldur, tað er tvælt at fáast við at laða garðar. Nógv betri er at hegna.



Kanska er tað rætt, men teir, sum fáast við at laða garðar vita, at største arbeiðið er at rudda rustaðon jarntráð og rotnar hegnpelar burtur frá garðinum, so sleppst framat steinunum. Hegnpelarnir og tráðurin eru neyvan meira enn 10 ára gamlir og teir kappast í dag við hesar gomlu steinar, íð her hava ligið í milliónir av árum og sum mannahond hevur verið á, síðan menn tóku búgv í Føroyum fyri eini 1200 árum síðan. Og so eru garðarnir ein partur av søguni og stríðnum ,ið legði grundarlagið undir okkara samfelag í dag. Kanksa eru hesar reglur eitt sindur av afturtrá, men tað ger einki.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og vestri og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin lækkar hann niður í sunnan og um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 23 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 20 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 19 |
| New York | 18 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1009 hPa. norðan fyri Føroyar fer suðureftir og dýpist.




Lágtrýstið yvir Bretsku Oyggjunum fer móti Suður-Noreg og gevur ein ternusnert teir fyrstu dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/05 kl. 06⁰⁰–14/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,4°
Minsti hiti máldur í mai ÷3,0° Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/05 kl. 06⁰⁰–14/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 23,3 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

15. mai: Seinna kvarter/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. mai | 01.29 | 14.05 | 00.29 | 13.05 | 00.44 | 13.20 | 03.29 | 16.05 | 04.29 | 17.05 | — | 12.20 | 11.20 | 23.53 | 01.44 | 14.20 | 02.44 | 15.20 | 01.14 | 13.50 | 02.29 | 15.05 |
| 16. mai | 02.38 | 15.11 | 01.38 | 14.11 | 01.53 | 14.26 | 04.38 | 17.11 | 05.38 | 18.11 | 00.53 | 13.26 | — | 12.26 | 02.53 | 15.26 | 03.53 | 16.26 | 02.23 | 14.56 | 03.38 | 16.11 |
| 17. mai | 03.29 | 15.48 | 02.29 | 14.48 | 02.44 | 15.03 | 05.29 | 17.48 | 06.29 | 18.48 | 01.44 | 14.03 | 00.44 | 13.03 | 03.44 | 16.03 | 04.44 | 17.03 | 03.14 | 15.33 | 04.29 | 16.48 |
| 18. mai | 04.06 | 16.25 | 03.06 | 15.25 | 03.21 | 15.40 | 06.06 | 18.25 | 07.06 | 19.25 | 02.21 | 14.40 | 01.21 | 13.40 | 04.21 | 16.40 | 05.21 | 17.40 | 03.51 | 16.10 | 05.06 | 17.25 |

Uppsetan av antennum og parabolum
Ring og hoyr nærri ella støkk inn á gólvið




Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radioep@olivant.fo
RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16 · FO- 100 Tórshavn
Tlf. 318277 · Fax 318377

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Lýðarsvegur 15 • Havn
Tlf. 319544